# EG ERI TROYTT AV ORÐINUM HAPPING

VIT KENNA HANA SUM RØDDIN AFTANFYRI TEY GÓÐU RÁÐINI Í SENDINGINI »GÓÐAN MORGUN FØROYAR«. **BJØRGHILD DJURHUUS**, HEILSUFRØÐINGUR, MAMMA, OMMA OG RÁÐGEVI, HEVUR NÓGV JØRN Í ELDINUM



BØRN
Inna Törnroos
inna@sosialurin.fo



*Bjørghild Djurhuus vil leggja dent á at fáa skúlabørnini at trívast.*

MYND: JENS KRISTIAN VANG

Bjørghild Djurhuus tekur ímóti í gongini í gráari, bundnari troyggju, gráum kjóla og hvítum ullsokkum. Heim hennara hevur fyri stuttum verið í Rákinum, tá tað handlaði um, hvussu ein inrættar seg eftir, at børnini eru flutt heimanífrá. Bjørghild og maðurin Martin eiga trý børn og fýra ommu- og abbabørn.

Bjørghild er útbúgvin sjúkrarøktarfrøðingur og heilsufrøðingur. Aftrat tí hevur hon tikið nógvar eftirútbúgvingar, og umframt arbeiði sum skúlaheilsufrøðingur fæst hon við sítt privata virki.

– Eg fyrilesi nógv. Beint nú arbeiða eg og ein starvsfelagið við einum trivnaðarskeiði, sum eitur »Tað ber til, at trívast«, ið leggur dent á at fáa børn at læra seg at síggja møguleikar fram um trupulleikar, sigur Bjørghild Djurhuus.

Hon er troytt av orðinum happing. Hon vil helst sleppa frá at brúka tað orðið. Heldur vil hon tosa um trivnaðin í skúlunum.

– Heldur tú veruliga, at øll trívast, bara tí ongin verður happaður? Nei, tað gera tey ikki. Vit vilja økja um trivnaðin í skúlunum, og tí fara vit runt til alla 6. flokkar við hesari verkætlanini, sigur hon.

### Brennur fyri tannáringum

Bjørghild ráðgevir ikki bara í Kringvarpinum, men eisini í egnu fyritøkuni »Tvinna«. Hon brennir serliga fyri tannáringum, tí hon heldur, at tey eru ein yvirsæddur bólkur, ið ein oftast bara gremur seg um og ikki skilur.

– Tað er nógv granska um heilan hjá tannáringum, og nógv av tí, sum er komið fram, er, at tey kunnu ikki gera við, at tey eru, sum tey eru. Tað er heilt einkult nøkur ting, sum ikki eru komin uppá pláss hjá teimum enn, greiður hon frá.

Bjørghild vendur sær eisini frá orðinum »problembørn« – tað eru ongi slík til – tey eru børn við problemum, og tað ber til at loysa.

Best dámar henni at tosa við alla familjuna hjá einum barni, ið hevur trupulleikar, og tes skjótari tey venda sær til hana tess betri.

### Tíðarmangul

Ein av trupulleikunum, hon ofta sær hjá børnum og familjum, er mangul upp á tíð.

– Børn sakna tíð saman við foreldrum sínum. At man setur seg niður og tosar um dagin, sum hevur verið, uttan at telefonin ringir, sjónvarpið stendur frá og mailurin tikkar inn í telduna.

Nógvir av trupulleikunum innan familjur í dag høvdu kunna verið loystir við betri kommunikatión.

– Spyr barnið. Spyr hví, vís áhuga í tínum barni, sigur Bjørghild.

Sjálv sigur Bjørghild seg hava verið ein rættuliga strang mamma, og ein morgun tá eina dótturin hevði hoyrt hana í útvarpinum ringdi hon og segði »Mamma eg hevði ynskt, at tú var mamma mín nú, tí soleiðis segði tú ikki, tá eg var 16«. Bjørghild flennur at minninum, men sigur at man lærir, so leingi sum man livir og sjálvandi gera vit øll feilir.

### Dámar ikki »Nanny«

Tey sokallaðu »Nanny-sendingarnar« gevur Bjørghild ikki nógv fyri.

– Tær seta børnini inn í eitt kamar, tá tey eru ill. Hugsa tær sjálv, hvussu ill tú hevði blivið, um maðurin hjá tær hevði læst teg inn í einum kamari, til tú var blíð aftur? Eg hevði so blivið rasandi, sigur Bjørghild.

Harafturímóti tekur hon undir við, at nógv av foreldrunum í »Nannysendingunum« hava brúk fyri at traðka í karakter og blíva týðilig vaksin.

At verða ein góð fyrimynd fyri sínum børnum er eisini nakað, Bjørghild vendur aftur til fleiri ferðir undir samrøðuni.

– Av tí sum børn arva frá okkum foreldrum er bara átta procent tað, vit siga, restin er títt kroppsmál, tín máti at tosa við og um onnur fólk og títt menniskjasýn, sigur hon.

Nógv dømi eru upp á børn, ið eru sligin, sum lova at soleiðis skulu tey ongantíð gera við síni børn, men tá tey koma í somu støðu sjálvi, er tað júst tað tey gera, eftisum tað er einasti háttur, tey hava lært at loysa trupulleikar uppá.

Áðrenn eg og Bjørghild siga farvæl, má eg sjálvandi spyrja, hví 2 ára gamli sonurin ikki vil eta, og hvat hon heldur um vinkonurnar, sum bara lata pápparnar at børnunum sleppa at hava tey annaðhvørt vikuskifti. Bjørghild er von við slíkar spurningar. Hon fær tað at ljóða lætt at fáa sonin til matarborðið og minnur meg á, at matur er ein háttur at gera vart við seg hjá børnum, eftisum tey vita, at svangan vil mamma so ikki hava meg at ganga.

Hin trupulleikin er sjálvandi torførari, men at pápar í Føroyum mugu uppá barrikadurnar eru vit báðar rørandi einigar um.

Bjørghild hevur longu næstu samrøðu nakrar minuttir, eftir at eg eri farin. Síðani gongur leiðin út á bygd, har hon heldur á fram við arbeiðinum at fáa meiri trivnað inn um skúlagátt.